# Kunning og áheitan um at taka lut í kanning

**Navn á kanningini**: *Næmingaráð í Norðurlondum* (Students' councils in the Nordic region)
**Vegna**: Norðurlendsku vælferðarmiðstøðina og Norðurlendska ráðharraráðið
**Høvuðusgranskarar:**

- Ragný Þóra Guðjohnsen (ragny@hi.is)
- Eva Harðardóttir (evahar@hi.is)

**Granskari umboðandi Føroyar:**

- Frida Poulsen (fridap@setur.fo)

**Endamálið við kanningini**

Endamálið við kanningini *Næmingaráð í Norðurlondum* er at kanna, hvussu næmingar í fólkaskúlum í Norðurlondum luttaka í næmingaráðum.

**Kanningarháttur**

Kunningin verður fyrst og fremst gjørd við einum spurnablaði, sum verður sent talgilt til næmingar í 5. og 9. flokki. Spurnablaðið er eins fyri øll luttakandi londini (Føroyar, Danmark, Ísland, Norra, Áland, Grønland og Finnland), so tað ber til at sammeta svarini. Svarað verður talgilt, og svarini vera send at vera greinað í Íslandi. Næmingarnir verða spurdir um sína luttøku í næmingaráðum, teirra royndir við luttøkuni, um teir kenna endamálið við næmingaráðum, og hvussu teir meta um sínar møguleikar at hava ávirkan. Hetta merkir t.d., um teirra uppskot verða hoyrd og leiða til broytingar í skúlanum.

**Trygd og trúnaður**

Øll svar verða anonymiserað. Eingin persónlig eyðmerking er í spurnablaðnum, og allar upplýsingar verða viðgjørdar í trúnaði, har navnloynd verður tryggjað. Tá dátugreiningin er liðug, verða allar dátur strikaðar.
Hóast ongar persónligar upplýsingar verða spurdar, og øll svar verða viðgjørd í trúnaði og anonymiserað, so hevur næmingurin rætt til at nokta at luttaka í kanningini, steðga við at svara ella lata vera við at svara einstøkum spurningum. Eisini hava avvarðandi møguleika at boða avvarðandi skúla frá, um tey ikki ynskja, at teirra barn luttekur.

**Takk fyri luttøku**

Kanningin, sum verður nýtt í eini frágreiðing og vísindaligum greinum um evnið hevur alstóran týdning í víðari arbeiðnum at menna demokratiskar tilgongdir í skúlanum. Tí eru vit sera takksom fyri, at næmingurin luttekur í kanningini. Tað tekur bert stutta tíð at fylla út spurnablaðið.

**Vinaliga**

*Ragný Þóra Guðjohnsen, Eva Harðardóttir og Frida Poulsen*

G.G. Seinni verður kanningin møguliga víðkað við at gera fokusbólkasamrøður fyri at fáa innlit í góðar hættir at arbeiða við og í næmingaráðum, har ung hava møguleika at luttaka og menna demokratiska luttøku í skúlanum. Um hetta verður viðkomandi, so verður nýggj kunning og umbøn um samtykki send viðkomandi skúlum, avvarðandi og næmingum.